# Krabbameinsútgreining
# Illgruni um móðurmerkjakrabba í húðini

## Sjúkueyðkenni, ið geva illgruna um móðurmerkjakrabba í húðini

Um lækni hevur illgruna um móðurmerkjakrabba, kann ávísast til krabbameinsútgreining.
Illgrunin kann íkoma av:

- Móðurmerki við sjúkueyðkenni:
  * broyting í eldri ella nýtilkomnum pigmenteraðum elementi
  * serligt skap, lit og/ella asymmetri
  * subjektivar klagur, sum óbehag, sviði, pína og skriði
- Nýtilkomin skjóttvaksandi knykil í húðini, evt. pigmenterað og við sárum
- Eyðsýnd broyting í eldri nýtilkomnum pigmenteraðum elementi
  *kolasvart
  *blandað kolasvart og reyðbrúnt
  * kámur gráblaúr knykil

Sjúkrasøga við nýggjum elementi ella við broyting í gomlum elementi eru mest sensitivu sjúkueyðkenni tengd at móðurmerkjakrabba.
Nýggj móðurmerki koma í barna-og ungdómsárum, men sjáldan eftir 40 ára aldur.
Skriði er minst spesifikka sjúkueyðkennið og kemur ofta í góðkynjaðum,akvisittum nævi.

## Handfaring av residiv, progressión og nýtilkomnum móðurmerkjakrabbameini

Í uppfylgjanarperioduni: Ávísa til ábyrgdarhavandi deild/ambulatorium
Eftir uppfylgjanartíðarskeiðið: Nýggj ávísing gerast til krabbameinsútgreining
Um illgruni er um nýtt móðurmerki, ið hevur sjúkueyðkenni nevnd omanfyri, skal ávísast til krabbameinsútgreining

## Ávísingin

Útfyll vinarliga ávísingarfrymilin "Illgruni um móðurmerkjakrabba í húðini" undir móttakandi eindini "Krabbaútgreining" í Cosmic. Lýs støðuna undir aktuelt - íroknað nær sjúkutekini eru íkomin v.m.
Orða vinarliga ávísingina so neyvt, at tað er lætt hjá serøkinum at visitera og bíleggja viðkomandi kanningar, so útgreiningartilgongdin verður so skynsom sum gjørligt.

Útgáva januar 2026